Chase til Gøteborg

við stuðli frá Atlantsflog

Rockbólkurin Chase væntaði sær ikki nakað, tá farið varð til Odense at luttaka í kappingini "Yamaha Band Explosion", har kappast skuldi móti royndum bólkum á teirra heimavølli.

Tí tordi Chase eisini at gera avtalu við TB um at spæla til konsert seinasta leygarkvøld. Teir væntaðu stutt sagt ikki at koma víðari.

Men Chase vann í Odense, og tí var neyðugt at útseta konsertina í Suðuroynni, og varð farið til verka at finna sponsorar fyri at kunna fara til Gøteborg.

Týsdagin fekk Chase avtalu við Atlantsflog, ið hevur játtað Chase at fíggja stóran part av útreiðslunum fyri túrin. Chase takkar fyri henda stuður og sigur, at utan Atrlantsflog kundi Chase ikki farið til Gøteborg.

Chase fer til Danmarkar í dag og víðari til Gøteborg í morgin ári. Kappingin í Gøteborg verður í annaðkvøld.

Tey koma øll heim aftur sunnukvøldið.

KFUM

Bingo verður leygardagin kl. 15.00.

Kafé-kvøld í KFUM

Í kvøld kl. 21.00 verður alment kafé-kvøld. Evnið er: Men størstur er kærleikin.



RUNAVIK
Íróttarhøllin
Fríggjadagin 28.9., kl. 19.00
Atgongumerki: Kiosk «Vón»

TÓRSHAVN
Gundadalshøllin
Leygardagin 29.9., kl. 16.00 og 19.00
Atgongumerki: Kunningarstovan

KLAKSVÍK
Kl.-høllin
Sunnudagin 30.9., kl. 19.00
Atgongumerki: A.P. Radio

SUÐUROY
Íróttarhøllin í Tróngisvaag
Mánadag 1.10., kl. 19.00
Atgongumerki: Tangakaffar

«Super Cirkus-kynstur við fremstu sirkus-fólkum úr 6 ymiskum londum.
Undirhald fyri alt hoskið — ókeypis atgongd fyri børn 3 ár og yngri.

GALLA CIRKUS

Samráðing og vinnlívsrættur

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Íðnaðarfelag hala fram við síni røð av skeiðum í samstarvi við skeiðtænastu Handilsskúlans.

Nú lýsa tey við skeiði í samráðingarteknikki og skeiði í vinnulívsrætti.

Skeiðið í samráðingarteknikki verður 8. og 9. november á Handilsskúlanum í Havn. 10 luttakarar kunnu verða við, ogskeiðið kostar 2.300 krónur. Tó sleppa limir í Føroya Arbeiðsrafelag og Føroya Íðnaðarfelag fyri 1800 krónur.

Seinasta freist at tekna eg til hetta skeiðið er 22. oktober.

Skeiðið í vinnulívsrætti verður á Handilsskúlanum í Havn fimm dagar í tíðarskeiðinum 17. til 25. oktober, aftaná vanliga arbeiðstíð. Luttakararnir verða 15-20 í tali, og skeiðið kostar 1600 krónur. Limir gjalda tó bert 1200 krónur.

Tekningarfreistin r úti 5. oktober.



Vit vera í
PARKINI
10. okt.
Danmark-Føroyar

BBC

Hósdagur 27. september

6.25 Today's Viewing
6.30 BBC Breakfast News
9.00 News and Weather
9.05 Play Golf 8:10
9.30 Through the Garden Gate 3:6
10.00 Storytime: Who cased away the Goat
10.20 Music Time
10.30 Playdays - Barnasending
10.55 Five to Eleven
11.00 News and Weather
11.05 You and Me
12.00 News and Weather
12.05 ?
12.55 South East Weather
13.00 One O'Clock News
Followed by Weather and Farmers Update
13.30 Around Scotland: Follow the Shoal
13.50 Northern Lights
14.00 News and Weather
14.05 Town Portraits: Scarborough
14.15 Racing
15.00 News and Weather
15.50 News and Weather
16.35 Bad Boyes 10:10
17.00 Newsround
17.10 Blue Peter
17.35 Four Square 12:31
18.00 Six O'Clock News
18.30 Newsroom South East
19.00 Top of the Pops
19.30 Eastenders
20.00 Tomorrow's World
20.30 Birds of a Feather Comedy 4:15
21.00 Liberal Democrat
21.05 Nine O'Clock News
21.35 Clive James: Postcard from L.A.
22.25 Question Time
23.25 Business Matters 18:20
23.50 Weatherview
23.55 Friday's Viewing
0.00 Close

Euro Sport

Hósdagur 27. september

5.00 Sky World Review
5.30 International Business Report
6.00 The D. J. Kat Show
8.30 Eurobics
9.00 Eurosport News
10.00 Golf
11.00 Motor Sport
12.00 Polo
13.00 W.I.T.A. Tennis
17.30 Mobil 1 Motor Sport News
18.00 Eurosport News
19.00 W.I.T.A. Tennis
21.00 World Aerobatic Championships
21.30 Skins Golf
22.30 Football
0.00 Eurosport News
1.00 Close

Scansat/TV 3

Hósdagur 27. september

16.30 Barnasending
16.30 Chocky
17.00 Disney filmur: Her kemur Muncey
17.55 Veðurtíðindi og tíðindi
18.00 Eydnuhjólið
18.30 Grannarnir
19.00 Hon sá eitt morð
20.00 Tíðindi
20.03 »Spotlight«
20.45 »I kvøld við Robert Aschberg«
21.45 McCall
Fyrrverandi sangarinnan Evelyn Weaver setir seg í samband við McCall, ti 18 ára gamla dóttir hennara, Beverly, er endað í klørnum á »manageranum« Greg Rivers, sum bar orð fyri bert at hugsa um sini egnu áhugamál. McCall uppdagar eisini, at Rivers eisini er uppi í narkohandli. Men Beverly lurtar ikki eftir teimum, so McCall ger av at vísa henni prógv uppá, hvussu Rivers er.
22.45 »8 x Graham Greene«
TV3 sýnir nakrar stuttfílmar frá Thames Television bygdar á ymiskar søgur eftir Graham Greene. Hetta eru søgur, sum Graham Greene sjálvur heldur vera tær bestu, hann hevur skrivað.
Hendan eitur »Two Gentle People«. Av tilvild hittast tvey eldri fólk í eini viðarlund í Paris. Hvørgin teirra er lukkuliga giftur, og tey tosa væl saman. Tey fortelja hvørjum øðrum lívssøgu sína, og bæði hugsa tað sama: Tora tey at byrja av nýggjum, ella er tað ov seint?
23.45 Tíðindi
23.48 Liðugt

Sjónvarp Føroya

Hósdagur 27. september

19.00 Smáttan á preriuni
19.55 SvF-Lýsingar
20.00 Dagur og vika
21.00 Góði John
John er lærari. Konan er farin frá honum. Hann fer at vitja ein »terapi« bólk fyri frá-skild — og her gongur nógv løgið fyri seg. Hin vakra Kate dregur menn til sín. Ralph er bangin fyri konufólkunum og Kirk er púra hopleysur, men John verður skjótt miðepilin í hesum bólkinum.
Judd Hirsch spælir John.
21.25 Vald peningsins 1:6
Einaferð var uppfatanin av pengum øðrvísi enn hon gjørdist seinni. Paulus segði, at »pengar vóru rótin til alt ónt«. Shakespeare kallaði teir í »Timon fra Athen« »tann guli trælurin«. Men seinni í 19. øld fórdi idnaðarmenningin eina aðra uppfatan við sær.
22.15 Narkoleiðin 5:6
23.10 Flora Danica
23.40 Liðugt

Útvarp Føroya

Fastar sendingar gerandisdagar:

7.15 Veðurtíðindi og tíðindi
7.18 Morgunlestur
7.30 Veðurtíðindi og tíðindi
7.35 Góðan morgun Føroyar
8.00 Veðurtíðindi og tíðindi
8.05 Góðan morgun Føroyar - framhald
9.00 Veðurtíðindi og tíðindi
9.05 Morgunlestur
9.15 Dagsins tónar
10.00 Veðurtíðindi og tíðindi
10.05 Fimleikaløtan
10.10 Lurtararnir og vit
11.00 Tíðindi
11.30 Undir døgurða/Sjómansvísur
12.00 Tíðindi
12.01 Middagstónleikur
12.15 Veður og valuti
12.20 Tíðindi og kunngerðir
12.35 Døgurðatónar
13.00 Veðurtíðindi
14.00 Veðurtíðindi
— — —
17.00 Veðurtíðindi
18.30 Veðurtíðindi og tíðindi
21.00 Veðurtíðindi og tíðindi

Hósdagur 27. september

9.15 Fyri tey smáu
9.30 Osek og kortini dømd - 14. partur
11.01 Fritíð og itriv - Jóhann Mortensen leggur til rættis
13.01 Nýtt og gott gamalt - Martin Sømark velur løgini
17.05 Velvet underground - Hugin Eide og Ivan Niclasen leggja til rættis - 2. sending
17.30 Fritíð og itriv (e)
18.00 Barnaútvarpið
19.00 Pris eftir dygd
Tosað verður um eina nýggja skipan, sum norðmenn hava sett í verk, har prisur verður latin eftir dygdini á fiskinum.
Fyribils fær manningin eina krónu eyka fyri kilo fyri væl hagreiddan fisk.
Í sendingini verður eisini nomið við at normenn meta, at um rætt var farið um, kundi norski fiskaflutningurin givið 2-3 ferðir so nógv av sær, sum nú.
Tað er Helgi Jacobsen, sum hevur lagt til rættis.
19.30 Løg mær dámar - 4. sending hjá Kaj Johannesen
20.00 Fimmarin (e)

Takið lut í politiska kjakinum!

Tak lut í teim mongu tiltøkunum, sum Suðurstreymoyar Javnaðarfelag skipar fyri.

Tekna teg sum lim.

☐ Ja, eg tekni meg sum lim í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

Navn: _____

Bústaður: _____

Kannað postverkinum

Verður sent óposstað. Móttakarin rindar postgjaldið

204

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag
Box 76
110 Tórshavn